# Heilsuverkið skuldi verið



*Um málið er størri dygd og fleiri nøgdir sjúklingar, er starvsfólkaleiðsla og starvsfólkamenning ein fyritreyt, heldur Jóhanna Andreasen, høgru megin, HR-mennari í Eik og fyrrverandi starvsfólk í heilsuverkinum. Her avmyndað saman Elini Wang, HR-mennara hjá Tórshavnar Kommunu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Føroyska heilsuverkið manglar starvsfólk, og eftirspurningurin fer ikki at minka tey komandi árini. Fyri at útvega, gagnnýta, og varðveita røttu starvsfólkini skal nýggj Human Resource deild setast á stovn í Heilsuverkinum. Hetta er eitt av tilmælinum í sjúkrahúsálitinum, og sambært serkønum fólki er hetta alneyðugt**

SJÚKRAHÚSÁLIT
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Human Resource Menning er eitt nýtt hugtak í føroysku vinnuni og er næstan ókent í almennu fyrisitingini. Ein av føroysku slóðbrótarunum á hesum øki er Eik Banki, sum í Februar 2006 setti á stovn eina HR deild, sum í dag hevur tvey fólk. Einasta almenna arbeiðspláss, ið hevur sett HR-mennara, er Tórshavnar kommuna.

Sosialurin hevur tosað við Jóhannu Andreasen úr Eik og Elin Wang úr Tórshavnar Kommunu um nýggja tilmæli um HR deild í Heilsuverkinum. Jóhanna og Elin eru báðar sjúkrarøktarfrøðingar og hava arbeiðsroyndir í heilsuverkinum.

Tær leggja báðar dent á, at starvsfólkamenning skal stuðla undir eina orðaða visión hjá fyritøkuni.

- Fyrst mugu virðini og visiónin orðast, út frá hesum kann eitt yvirlit gerast yvir, hvørji starvsfólk brúk er fyri. Og nústaðni tá kunnu vit leggja menningarætlanir, skeiðir og annað til rættis, sigur Jóhanna Andreasen.

Elin Wang lýsir tað við eini mynd.

– Ikki at hava eina yvirskipaða ætlan er sum at skjóta eina rúgvu av pílum avstað og so aftaná fara og seta málskivuna upp. Á heilsuøkinum er peningur settur av til skeið, men spurningurin er, um hann verður brúktur nóg effektivt.

Jóhanna heldur, at sjúkrahúsverkið manglar skipað viðurskifti á hesum økinum.

- Tað er ongin yvirskipað ætlan. Fólk fara á hissini skeið her og der. Men ongin felags visión er, ongin orðað ætlan, ongin sum stingur út í kortið og sigur, hygg, hetta hava vit brúk fyri, og hetta kanst tú brúkast til.

Tað er tí sera jaligt, at ein HR deild er partur av nýggja sjúkrahúsálitinum, halda tær báðar.

### Tá fólk støðast

Fólk eru ymisk, og tað er eisini ymiskt, hvat fær eitt starvsfólk at trívast. Men nakrir felags faktorar eru. Kanningar vísa, at starvsfólk, sum trívast, kenna, at tey hava ávirkan á stovnin, tey fáa feedback og viðurkenning, og leiðslan er opin og álitisvekjandi.

- Bispebjerg Hospital hevur kannað, hvat starvsfólkini meta hevur størst týdning fyri trivnaðin. Niðurstøðan var: fakligar avbjóðingar, gott kollegialt umhvørvi, nýmótans leiðsla og persónlig ávirkan. Lønin var, sigur Jóhanna Andreasen, so løgið tað ljóðar, ikki á listanum.

Fólk søkja ikki bara eftir pengum í dag. Fólk søkja avbjóðingar, spenning og sjálvrealisering. Og tí eigur sjúkrahúsverkið ikki at vera bangið fyri at taka kappingina upp við til dømis privatar fyritøkur. Arbeiðsøkið er so vitanartungt, og menningin so stór á økinum, at heilsuverkið